# Oljuvinnufelagið

# Ársfrágreiðing fyri 2013

# Um felagið

Oljuvinnufelagið er eitt áhugafelag fyri fyritøkur, sum longu eru virknar í oljuvinnuni ella ætla sær virknan lut í hesi vinnu.

Uppgávan hjá felagnum er at útinna felags áhugamál og at verja áhugamálini hjá limunum. Umsiting felagsins er í Vinnuhúsinum.

Tá stovnandi fundurin varð 2. apríl í 2001 vóru tað 27 feløg, sum teknaðu seg sum lim. Í dag er limatalið 31. Í nevndini í Oljuvinnufelagnum sita:

Magni Arge, formaður
Gunnbjørn Joensen, næstformaður
Anja Jacobsen
Jostein Petersen
Eli Lassen

Tiltakslimur er Christian Danielsen

# Yvirlit yvir limirnar

| | |
|---|---|
| Atlantic Airways | Poul Hansen P/f |
| Atlantic Supply Base | Poul Michelsen P/f |
| Damfar P/F | Radioservice P/F |
| Demich P/F | Reyni-Service P/F |
| El-Service | Samskip P/f |
| Faroe Ship P/f | Skansi Offshore P/f |
| Føroya Gassøla Sp/f | Smyril Blue Water |
| Ingeniørvirkið Jostein Petersen | Solar P/F |
| J & K Petersen Contractors P/f | Sveisingahandilin P/F |
| Kemilux | Thor P/F |
| KJ-Hydraulik | Tórshavnar Havn |
| LM Electric P/f | Vest Pack P/F |
| Lundin (Lundin software), Sp/F | Vesturvón P/F |
| Meginfelag Búnaðarmanna L/F | Virkisráðgeving Sp/f |
| Offshore Directory Sp/f | Vónin P/F |
| PAM Offshore service | |

# Virksemi á føroyskum øki og innan føroyska oljuvinnu

Statoil stendur fyri at bora tveir brunnar á føroyska landgrunninum í summar, og er hetta størsta virksemið í Føroyum innan oljuvnnina síðani 2001.

Fyrra leitiboringin hjá Statoil er framhald av Brugdan 2 í ein landssynning úr Føroyum. Boringin varð tikin upp aftur har sum Statoil slepti og pluggaði boriholið móti vetri 2012. Tá rakk Statoil ikki niður á ta dýpi, sum ætlað var, og ivaleyst er ætlanin hesaferð at koma á mál.

Tá boringin á Brugdan 2 er liðug, verður hildið fram nakað eystanfyri á nýggja brunnin Súlan/Stelkur.

Flestu veitingar av vørum og tænastum til boriplatformin West Hercules koma frá føroyskum fyritøkum. Hetta er fyrstu ferð at bæði flutningur loftvegis og sjóvegis til pallin eru í hondunum á føroyskum veitarum. Esvagt Don hjá reiðarínum Thor liggur við pallin, Sjóborg hjá reiðarínum Skansi Offshore tekur sær av flutninginum sjóvegis og Atlantic Airways av flutninginum loftvegis.

Veitingrnar fara annars allar um kajkantin hjá Atlantic Supply Base í Runavík, sum soleiðis eisini virkar sum ein logistiskur miðdepil.

At flestu veitingar til boripall á føroyskum øki nú eru hjá føroyskum fyritøkum, er staðfesting um, at føroyingar og føroyskar fyritøkur hava røttu førleikarnar at taka hesar uppgávur á seg á einum kappingarførum støði.

### Marknaðarføra landgrunnin

Allar boringar eru týdningarmiklar, men hesar, sum nú fara fram, hava helst serligan týdning, tí onki oljufelag hevur bundið seg til nakra aðra leitiboring í Føroyum. Úrslitið av leitiboringunum hjá Statoil hevur tí stóra ávirkan á hugin hjá bæði Statoil og øðrum oljufeløgum framhaldandi at gera íløgur i føroyska oljuleiting.

Oljuvinnufelagið fegnast tí eisini um, at landsstýrið og Jarðfeingið hava tikið stig til at gera meiri burturúr marknaðarføringini av føroyska landgrunninum mótvegis oljufeløgunum, men harmast um, at hetta virksemið skal fíggjast við avlopspeningi, sum annars var ætlaður til førleikamenning. Fealgið gjørdi vart við síni sjónarmið í skrivi til Vinnunevndina fyrr í ár:

> "Oljuvinnufelagið mælir til, at væl meiri verður gjørt burturúr at marknaðarføra føroysk leitimið, og felagið tekur eisini undir við, at stig verða tikin benanvegin.
>
> Felagið metir, at løgtingið eigur at seta pengar av á fíggjarlógini til eina áhaldandi marknaðarføring yvir fleiri ár, heldur enn at dúva uppá møguligan avlopspening fra upphæddum, sum oljufeløg hava sett av til førleikamenning.
>
> Við hesum lógar uppskotinum er fyri ein part vandi fyri, at marknaðarføringin verður óstøðug, og fyri ein part er vandi fyri, at upphæddirnar til førleikamenning ikki verða brúktar til ætlaða endamálið. Havandi í huga, hvussu stór framstig eru rokkin í førleikamenning higartil, metir Oljuinnufelagið, at skipanin skal halda fram, og at oljufeløg, myndugleikar og vinnufeløg skulu eggjast til at fara eitt stig longri í førleikamenning upp til enn hægri førleikastig. Vit meta, at tað kann verða vandi

fyri, at Jarðfeingð kemur í eina tvístøðu, um pengar ikki verða settir av beinleiðis til marknaðarføring, tí so kann peningur einans útvegast, um hildið verður aftur í fíggingini av førleikamenning, soleiðis at restpeningur frá oljufeløgum fellur til marknaðarføringsendamál.

Oljuvinnufelagið metir eisini, at tað er umráðandi at eggja oljufeløgum til at verða virkin i førleikamenningini, men vandi er fyri at hendan eggjanin fellur burtur, um feløgini bara kunnu lata standa til og lata peningin fara til marknaðarføringsendamál ístaðin. Tí eigur í minsta lagið at verða ásett eitt hægsta mark fyri, hvussu stórur partur av førleikamenningarpengunum kunnu fella til marknaðarføring."

Løgtingið samtykti tíverri uppskotið uttan broyting.

## Ongin olja, men stórt virksemi

Tilgongdin til oljuvinnu í Føroyum hevur í heila tikið eydnast væl, tí hóast vit onga olju framleiða enn, er oljuvinna millum størstu vinnugreinar í Føroyum. Nýggj greining vísir, at heili 942 føroyskir løntakarar starvast innan oljuvinnuna. Hetta er væl at merkja teir føroyingar, sum hava sín bústað í Føroyum. Afturat hesum koma teir føroyingar, sum eru búsitandi aðrastaðni. Størsti parturin av arbeiðsmegini er mannfólk. Í 2013 starvaðust 25 konufólk og 917 mannfólk innan oljuvinnuna.

| Arbeiðsmegin | 2012 | 2013 |
|---|---|---|
| Tal av løntakarum | 858 | 942 |
| % av arbeiðsmegini | 3,61 | 4 |

| Arbeiðsgevarar | 2012 | 2013 |
|---|---|---|
| Før. arbeiðsgevarar | 608 | 674 |
| Útl. arbeiðsgevarar | 250 | 268 |

| Arbeiðsøki | 2012 | 2013 |
|---|---|---|
| Offshore | 349 | 361 |
| Onshore í Føroyum | 70 | 65 |
| Onshore uttanlands | 194 | 243 |

Kelda: Virkisráðgeving (VRG), kanning frá 2013

Grundleggjandi tykist føroysk vinna vera rættiliga væl fyrireikað til eina menning av kolvetnisvinnu í Føroyum, sum júst virksemið saman við Statoil ber prógv umi. Harafturat hava vit í útlondum stórt fólkatilfeingið, sum er virkið í vinnuni, at taka til.

Tað ongin orsøk at óttast fyri, at føroyingar ikki eru mentir at veita oljuvinnuni holla tænastuni í sambandi við eitt nú leitivirksemi.

Vit eiga tí í Føroyum at áseta klárt og greitt, at føroysk luttøka í oljuleiting og oljumenning í Føroyum er eitt krav, og at vit ynskja framhaldandi menning av førleikum til oljuvinnu.

Oljuspurningar hava verið á breddanum á fleiri almennum tiltøkum í ár – eitt nú fyri føroyingum í Danmark á Christiansborg og í Løkshøll í Runavík. Oljuvinnufelagið tók eisini lut, og hjáløgd er dagførd framløga, sum formaðurin legði fram á tiltøkunum.

Oljuvinnufelagið mælir til, at ein ráðleggingarnevnd verður sett at eftirmeta gongdina higartil og veita ráð um framtíðar menning. Ráðleggingarnevndin nýtist ikki at

kollvelta vælvirkandi kolvetnislógina og leistin, hon er skorin eftir. Hinvegin skal hon taka upp spurningin um, hvussu vit menna okkum uppaftur meiri á hesi leið, og samstundis kann hon viðgera spurningin um, hvussu henda luttøka í altjóða oljuvinnu kann skipast í samljóði við virksemi heima í Føroyum. Nakrir setningar at taka upp eru hesir:

- *Lógir og reglugerðir tillagast í mun til ambitiónir*
- *Eggja til størri leitingarvirksemið*
- *Víðari menna kjarnuførleikar*
- *Føroysk luttøka á hægri støði*
- *Menna nýggjar strategiskar førleikar*
- *Betri javnvág millum arbeiðsmarknað í Føroyum og í útlondum*
- *Staðfesta og menna Føroyar sum maritiman tænastudepil*

Fleiri ivast í, um Føroyar sum samfelag eru nóg væl fyrireikaðar til eitt oljufund, og tí er tað umráðandi at taka upp spurningin um, hvussu samfelagið fyrireikar seg til eitt oljufund í Føroyum. Aðrir setningar at taka upp kunnu tí verða hesir:

- *Hvussu fær samfelagið Føroyar besta úrslitið*
- *Stimbra vinnuligt virkisfýsni, margfeldni, altjóðagerð*
- *Virka fyri burðardyggari samfelagsligari javnvág*
- *Varveita og menna føroyska samleikan*
- *Oljugrunnur – hvussu skal hann kjølfestast*
- *Neyðugt við breiðari politiskari og fólksligari undirtøku*
  *– sum ein nýggj búskaparlig grundlóg*

Avbjóðingin er at skapa felags fyrimunir fyri eina oljuvinnu og fyri føroyska samfelagið.

# Virksemi annars

## Luttøka á oljumessum

Løgmansskrivstovan boðaði tíðliga í ár frá, at Promote Faroe Islands ikki longur fór at samskipa føroyska luttøku á oljumessum uttanlands. Oljuvinnufelagið hevur sostatt yvirtikið henda samskipandi leiklut av í fyrsta umfari Offshore Northern Seas í Stavanger. Eftir hesa messuna má støða verða tikin til ein framtíðar leist fyri samskipan av oljumessum.

## Offshore Northern Seas 2014

Offshore Northern Seas 2014 verður í døgunum 25. – 28. august í Stavanger.

Hesar fyritøkur hava boðað frá luttøku: Atlantic Airways, Atlantic Supply Base, Skansi Offshore, Thor Offshore, Faroe Ship, PAM Offshore Services, Runavíkar Havn, Tórshavnar Havn, Vágs Havn, Tvøroyar Havn og Vága Floghavn. Eisini verður FOIB og Jarðfeingi við á messuni.

Talan er sostatt um breiða umboðan av føroyskari vinnu í Stavanger í august.

Tórshavnar Kommuna saman við Runavíkar Kommunu hava á festival-økinum niðri við havnina í Stavanger føroyskt telt, sum verður opið hvørt kvøld, meðan messan er, og er hetta saman við móttøku umborð á Westward Ho ein fastur, afturvendandi og týdningarmikil partur av messunum í Stavanger.

## Offshore Europe 2013

Stóra oljumessan í Aberdeen, Offshore Europe, varð í 2013 hildin í døgunum 3. – 6. september. Eins og vanligt er, vóru fleiri føroyskar fyritøkur við á messuni, og umleið 30 føroyingar vóru við í ferðalagnum til Skotlands.

Luttakandi føroysku fyritøkurnar vóru samlaðar á føroyska landabásinum, sum Promote Faroe Islands í samstarvi við Oljuvinnufelagið stóð fyri. Saman við grønlendsku fyritøkunum á messuni varð harafturat skipað fyri móttøku, har fyritøkurnar hava høvi at bjóða sínum samstarvsfeløgunum við.

Føroysku fyritøkurnar, sum vóru við á Offshore Europe í ár, vóru Atlantic Supply Base, Pam Offshore Services, Runavíkar Havn, Føroya Tele (Shefa), Atlantic Airways, Vónin, Faroe Ship, Vága Floghavn, Tórshavnar Havn, Vágs Havn og Atlantic Petroleum. Harafturat vóru umboð fyri Jarðfeingi og FOIB við á túrinum.